Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3615
Navn: Sp/f Faroeduct Clean
Adressa: 660 Søldarfjørður.
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 26.06.2003
Viðtøkudato: 26.06.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Anfinn Olsen, 660 Søldarfjørður.
Stjórn: Anfinn Olsen, 660 Søldarfjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, Gerðisvegur, 600 Saltangará.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, tænastuvinnu og handverk og annað starv í samband við hetta.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3621
Navn: Sp/f Havna-Grillin
Adressa: 370 Miðvágur.
Kommuna: Miðvágs Kommuna
Stovningardato: 27.06.2003
Viðtøkudato: 27.06.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Olfa Trabelsi Johansen, 370 Miðvágur.
Stjórn: Olfa Trabelsi Johansen, 370 Miðvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Grannskoðaravirkið Højmose v/ Børge Christiansen, 370 Miðvágur.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3616
Navn: P/F Háenni
Adressa: Kelduskákið 11, 700 Klaksvík.
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 26.06.2003
Viðtøkudato: 26.06.2003
Kapitalur: Kr. 640.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 640.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Poul Jacob Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík, Mary Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík og Gerda Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík.
Nevnd: Mary Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík (formaður), Hervør Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík og Gerda Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík.
Stjórn: Poul Jacob Joensen, Kelduskákið 11, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella allari nevndini í felag.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðan Jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaskvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu og aðra vinnu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 21, P/F Maria Poulsen & Co., 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
25.06.2003.
Kapitalur:
Hækking við kr. 500.000,00 til kr. 1.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 500.000,00 við grunshækking.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003
Kristin Balle

-tað loysir seg

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3620
Navn: Sp/f Munkurin
Adressa: c/o Jacob Thomsen, 490 Strendur.
Kommuna: Sjóvar Kommuna
Stovningardato: 27.06.2003
Viðtøkudato: 27.06.2003
Kapitalur: Kr. 471.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 471.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Jacob Thomsen, 490 Strendur.
Nevnd: Torgerð Thomsen, 490 Strendur (formaður), Jacob Thomsen, 490 Strendur og Terji Thomsen, 490 Strendur.
Stjórn: Jacob Thomsen, 490 Strendur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella allari nevndini.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskifar o.a. í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3623
Navn: Sp/f HH-Bókhald
Adressa: Vípuvegur 10, kj., 100 Tórshavn.

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 23.06.2003
Viðtøkudato: 23.06.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Høgni Hansen, Vípuvegur 10, kj., 100 Tórshavn.
Stjórn: Høgni Hansen, Vípuvegur 10, kj., 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 23.06.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka bókhaldsvirki og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2003
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3617
Navn: Sp/f Pure Atlantic
Adressa: 466 Ljósá.
Kommuna: Eiðis Kommuna
Stovningardato: 23.06.2003
Viðtøkudato: 23.06.2003
Kapitalur: Kr. 352.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 352.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Pól A. Poulsen, 466 Ljósá.
Nevnd: Anna Maria Poulsen, 466 Ljósá (formaður), Andrias Poulsen, 466 Ljósá og Pól A. Poulsen, 466 Ljósá.
Stjórn: Pól A. Poulsen, 466 Ljósá.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella allari nevndini í felag.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3618
Navn: Sp/f RN Maskinverkstaður
Adressa: 350 Vestmanna.
Kommuna: Vestmanna Kommuna
Stovningardato: 27.06.2003
Viðtøkudato: 27.06.2003
Kapitalur: Kr. 102.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 102.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Rógvi Aagaard Nielsen, 350 Vestmanna.
Stjórn: Rógvi Aagaard Nielsen, 350 Vestmanna.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka maskinverkstað, útleigan av maskinum, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3614
Navn: P/F SØK
Adressa: Varðagøta 30, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 26.06.2003
Viðtøkudato: 26.06.2003
Kapitalur: Kr. 510.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 510.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Sp/f Kaj Poulsen, 100 Tórshavn (Sp/f 3602) , Sp/f Øssur Andreasen, 100 Tórshavn (Sp/f 3604) og Sp/f Svend Andreasen, 100 Tórshavn (Sp/f 3603)
Nevnd: Øssur Andreasen, Varðagøta 32, 100 Tórshavn (formaður), Kaj Poulsen, Birnugøta 13, 100 tórshavn og Svend Andreasen, Varðabú 26, 100 Tórshavn.
Stjórn: Rigmor Andreasen, Varðagøta 32, 100 Tórshavn og Tummas Andreasen, Varðagøta 32, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini saman.
Grannskoðari: Sp/ KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at keypa, umsita og at útleiga fastogn umframt annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 30. juni 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 283, P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
28.02.2003.
Kapitalur:
Hækking við kr. 450.000,00 til 1.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 450.000,00 við grunshækking
Nevnd:
Farin úr nevndini: Morten Leo Clothier, Traðargøta 9, 160 Argir.
Innkomin í nevndina:
Reidar Nónfjall, á Fløtti 2, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2003
Kristin Balle

---

veitst tú ikki tað?

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3619
Navn: Sp/f Omega
Hjánøvn: Sp/f Om@ga (Sp/f Omega), Sp/f Omega.fo (Sp/f Omega) og sp/f Webes (Sp/f Omega).
Adressa: Nólsoyar PállsGøta 22, 700 Klaksvík.

Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 25.06.2003
Viðtøkudato: 25.06.2003
Kapitalur: Kr. 90.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 90.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Alan Joensen, Undir Fossum 79, 700 Klaksvík.
Stjórn: Alan Joensen, Undir Fossum 79, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóra.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðan jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, heilsølu og tænastu og annað virksemi sum náttúrliga hoyrir hesum til.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2003
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niŸanfyri standandi fráboŸan:

Skrásetingar-nr. P/F 2672, P/F LívstryggingarfelagiŸ Føroyar, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Joen Anfinnur Olafson Durhuus, 350 Vestmanna (formaŸur).
Innkomin í nevndina sum formaŸur: Trygvi Fossdal Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2003
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3173, P/F Faroe Real Estate Ltd., 410 Kollafjørður.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Janus Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2003
Kristin Balle

Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktarskipanina í Skála Kommunu, at byrja 18. august 2003.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Umsóknir skulu vera dagrøktarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 11. juli 2003.

Áhugað kunnu venda sær til Dagrøktarleiðaran á tlf. 227393 ella 442059.

Skála kommuna

:: HJÁLP - ARBEIÐI SØKIST ::

Fryntligur ungur maður úr Sveis, 25 ár, og pápi at einum smádrongi í Føroyum, søkir arbeiði á Streymoynni,Eysturoynni ella Vágunum.
Havi innivist í Havn.

- Havi handilsskúlaútbúgving við royndum
- Royndir í bókhaldi, fyrisiting og EDV
- Kønur í enskum og týskum, og dugi nakað av føroyskum
- Ongar trupulleikar við skiftandi arbeiðstíðum ella yvirtíðum
- Eri álítandi og arbeiðsamur

Kunnu tit hjálpa ? ...ynskja tit fleiri upplýsingar?...
Vitja mína heimasíðu **http://andras.meier.fo**

Felagsskúlin á Oyrarbakka

Lýsing eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004.

Talan er um:
- 1 fulltíðarstarv – 27 lønartímar
- 2/3 starv – 18 lønartímar

Serliga er brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í 8.-10. fl. í alis- og evnafrøði, kunningartøkni og dreingjafimleiki.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Fleiri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 423098.

Umsóknir saman við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinsta lagi 8. juli 2003.

Skúlastýrið fyri
Felagsskúlan á Oyrarbakka
v/ Mariu í Skorini
470 Eiði

Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til starv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er 32 tímar um vikuna. Setanartíðin er 5 mánaðir.

Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

Førleikakrøv:
Til starv krevst:
- Skrivstovuútbúgving ella hægri handilsskúli
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

Setanartreytir:
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jonni Dahl Hansen, yvirassistent, tlf. 31 10 03.

Umsóknir:
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu vera Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. juli 2003.

SORINSKRIVARIN Í FØROYUM,
tann 27. juni 2003

Henrik Møller
sorinskrivari

Hús í Århus til sølu

Nýggj raðhús (frá dec. 2001) í Hasle í Århus til sølu.

Í húsunum, sum eru 97 fermetrar í einari hædd, eru durur, baðiverilsi, grovkøkur (bryggers), rúmlig stova og køkur í einum, trý kømur og gangur. Harafturat kemur ein amboðsskúrur á 6 fermetrar. Uttanum húsini er alt gjørt.

Húsini standa í sera friðarligum og barnavinarligum umhvørvi, tætt við skúlar og barnagarð/vøggustovu. Grønt umráði við skóg og smásjógvum eru tætt hjá.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhan E. Simonsen á tlf 520 029 el. tlf 313 999

Skrivstovustarv í Fótbóltssambandi Føroya

Eitt skrivstovustarv í Fótbóltssambandinum verður við hesum lýst leyst til setan 15. august 2003 ella eftir nærri avtalu.

Møgulig málsøki:
- lands- og steypakappingarmál
- dómara- og eygleiðaramál
- røkt av heimasíðu FSF's í sambandi við lands- og steypakappingarnar
- bókhaldið

Vit hugsa okkum, at tú hevur:
- hollan kunnleika til føroyskan fótbólt
- kunnleika til fyrisiting
- kunnleika til bókhald – Lundan ella aðra bókhaldsskipan
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- góðan kunnleika til brúk av teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða:
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi, sjálvstøðugt starv, til tíðir strævið og krevjandi, men áhugavert og mennandi. Lønin verður eftir nærri avtalu.

Umsóknir:
Umsókn við møguligum upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

Fótbóltssamband Føroya
Postrúm 3028
110 Tórshavn

Umsóknirnar skulu vera Fótbóltssambandinum í hendi seinast 15. juli 2003.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ísak Mikladal, aðalskrivara, tlf. 211988.

Bakarasveinur

Okkum tørvar ein raskan bakarasvein. Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til:

P/F Frants Restorff
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

frants restorff

Toyota Picnic til sølu

Modell '99, diesel, 7 setur. Kostnaður 170.000 kr.

Áhugað kunnu ringja **tlf. 212559**